# Ein meira opin fúti



*– Av náttúru eri eg eitt ógvuliga opið menniskja, haldi eg sjálv, og tað fer vónandi at seta sín dám á mítt yrki her í Føroyum, sigur Karen Marie Olesen, sum væntandi verður ein meira opin fúti enn undangongumaður hennara.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Herfyri byrjaði nýggi fútin, Karen Marie Olesen, í starvinum. Hon sigur, at tá ið hon fekk tilboðið um at gerast fúti í Føroyum, ivaðist hon ikki í at taka av**

FÚTIN
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Millum føroyingar er tað ikki nøkur loyna, at fráfarni fútin ikki var serliga sjónligur, og tað var sjáldan, at hann var at síggja og hoyra í miðlunum. Nýggi fútin sigur seg hinvegin verða opna av náttúru, og tí kunnu vit vænta okkum ein meiri opnan fúta næstu fimm árini.

### Verið víða

Karen Marie Olesen er uppvaksin á landinum í Jútlandi, men flutti sum 18 ára gomul til Århus, har hon las løgfrøði.

Eftir lokna útbúgving fekk hon starv hjá løgregluni í Esbjerg, og har starvaðist hon í fýra ár sum løgreglufulltrúi. Seinni kom Karen Marie Olesen at starvast hjá ríkisløgregluni í Keypmannahavn.

Nýggi fútin í Føroyum hevur eisini starvast hjá løgregluni í Svendborg, í Nakskov og hesi seinnu árini hevur hon verið varafúti á Frederiksberg.

– Eg havi verið víða um, men eg havi allatíðina, síðani eg flutti úr Esbjerg, havt fastan bústað á Frederiksberg, og maðurin hjá mær hevur eisini allatíðina búð har, sigur Karen Marie Olesen.

### Vitjað fleiri ferðir í Føroyum

Nú Karen Marie Olesen er komin til landið at røkja nýggja starvið hjá sær, er talan ikki um fyrstu vitjanina hjá henni í Føroyum.

– Eg havi vitjað í Føroyum fleiri ferðir, tí eg ein av mínum vinum frá lestrartíðini hevur arbeitt í Føroyum í fleiri ár, og hana havi eg vitjað mangan. Somuleiðis havi eg arbeitt í Føroyum í eitt stutt tíðarskeið frá januar til august í 1997. Tað var í sambandi við skipamálini, greiðir Karen Marie Olesen frá.

Fútin sigur, at henni hevur altíð dámt væl í Føroyum, og bæði hon og maður hennara eru náttúrufólk burturav, og teimum dámar væl at ganga túrar úti í náttúruni.

– Eg havi áður, tá ið eg havi vitjað í Føroyum, verið túrar við gongufelagnum í Havn, og tað fari eg ivaleyst eisini at gera, nú eg eri flutt hagar. Men maður mín og eg havi eisini gingið túrar í føroysku náttúruni einsamøll, sigur Karen Marie Olesen.

### Góðar umstøður

Hesar fyrstu dagarnar, eftir at hon er byrjað í nýggja starvinum, hevur Karen Marie Olesen, verið á vitjan hjá løgregluni kring landið. Enn er hon ikki komin allan vegin runt, men hon sigur, at eftir hennara tykki eru umstøðurnar hjá føroysku løg-regluni góðar.

– Sum so líkjast politistøðirnar her á landi teimum flestu donsku, og tað sama er galdandi við arrestini í Jónas Broncksgøtu í Havn, sigur Karen Marie Olesen.

Nýggi fútin heldur tó ikki, at hon enn dugir at siga so nógv um føroysku løgregluna, tí at hon hevur verið her so stutt, at hon ikki enn er komin inn í tingini, sum hon málber seg. Karen Marie Olesen leggur tó afturat, at tað tykist tó fyri henni, sum um føroyska løgreglan er ógvuliga væl skipað.

### Kynið ongan týdning

Spurd, um tað er nakar munur á at hava ein kvinnuligan ella ein mannligan fúta, sigur Karen Marie Olesen, at tað heldur hon ikki.

– Í mínari verð er tað soleiðis, at øll eru ymisk, bæði mannfólk og konufólk. Øll mannfólk eru ymisk, og øll konufólk eru ymisk. Tí vil tað altíð verða munur á fólki, men eg trúgvi ikki, at kynið hevur nakran týdning í hesum starvinum, sigur hon.

At talan er um ein dana heldur enn ein føroying, dugir Karen Marie Olesen heldur ikki at síggja hava nakran týdning.

Hinvegin er tað ivaleyst ein ávísur munur á at verða fúti í Føroyum enn í Danmark, tí sum tey flestu óivað vita, so eru Føroya tað friðarligasta politiøki í ríkinum.

### Opin fúti

Mogens Nepper Christensen, fráfarni fútin, var millum manna ikki kendur sum ein fúti, ið tú hoyrdi ella sá nógv til. Hann var sjáldan frammi í miðlunum og var ógvuliga lítið sjónligur. Men nýggi fútin tykist ikki verða eins afturhaldandi sum undangongumaður hennara.

– Av náttúru eri eg eitt ógvuliga opið menniskja, haldi eg sjálv, og tað fer vónandi at seta sín dám á mítt yrki her í Føroyum. Tað er eisini umráðandi at duga at tosa við fólk í einum slíkum starvi, og tað meti eg sjálv, at eg dugi, sigur Karen Marie Olesen.

### Størri umsitingarligar avbjóðingar

Tað er nærliggjandi at hugsa, at Karen Marie Olesen, sum hevur starvast á Frederiksberg seinnu árini, fer at sakna eitt sindur av spenningi, nú hon er komin til friðarligu Føroyar, tí á gamla arbeiðsplássinum vóru ivaleyst nógv spennandi og umfatandi sakarmál. Men nýggi fútin sigur, at nú verða tað bara meiri spennandi á onkrum øðrum økjum.

– Her í Føroyum eru kanska ikki so nógv stór sakarmál, men hinvegin nú